FYRIBYRGINGARRÁÐIÐ

*Health promotion advisory committee of The Faroe Islands*

# FYRIBYRGINGARRÁÐIÐ BÚMERKJAKAPPING

Fyribyrgingarráðið er ráð undir Familju- og Heilsumálaráðnum, ið hevur til uppgávu at styrkja tiltøk fyri heilsufremjing, sjúku- og vanlukkufyribyrging, bæði í almanna- og heilsuverkinum. Uppgávur ráðsins eru sostatt at vera ráðgevi hjá myndugleikum og fólkinum sum heild. Virksemið er ætlað einstaklingum, bólkum og øllum borgarum.

Ætlanin er, at búmerki ráðsins í framtíðini skal prýða brævpappír og útgávur, ið Fyribyrgingarráðið letur úr hondum. Tað skal tí um møguligt lýsa heilsu fyri øll.
Støddin á tekningini skal vera u.l. 29x21cm (A4). Búmerkið skal vera í upp til 3 litum á hvítari bakgrund, skal vera einfald í strikuni, so hon kann minkast í stødd til u.l. 1,5x1,5 cm. Harumframt skal búmerkið vera egnað at prenta í svørtum/hvítum.

Tekningarnar skulu ikki vera signeraðar, men eitt eyðmerki verður sett aftanfyri á tekningini. Navn, bústaður og telefonnummar verður lagt hjá í afturlatnum brævbjálva, sum hevur sama eyðmerki sum á tekningini.

**Øll kunnu luttaka í kappingini. Uppskotini skulu vera Fyribyrgingarráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. desember kl. 12.00.**

Ein dómsnevnd við 3 persónum velur millum uppskotini. Latnar verða 3 virðislønir:

1. virðisløn kr. 15.000
2. virðisløn kr. 10.000
3. virðisløn kr. 5.000

Um dómsnevndin heldur, at onki av uppskotunum er nýtiligt sum búmerki, verður ongin virðisløn latin.

Uppskotini verða sýnd fram í sambandi við Altjóða roykfría dagin 31. mai.

Sosialurin 341800

Argjaboðagøta 7 · FO-160 Argir · Postsmoga 135 · FO-110 Tórshavn · Tel +298 315155 · Fax +298 320272 · Far +298 215165 · fyribyrg@kallnet.fo




Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú koyrir 30 km skjótari, enn loyvt er?

Harumframt fært tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!

rff




Minst til bilbeltið!

Helvtin av teimum, sum hava látið lív í ferðsluvanlukkum og ikki vóru í bilbelti, høvdu verið á lívi, um tey nýttu bilbeltið.

rff




Nýtir tú altíð blunkljósini?

Tað kann vera sera vandamikið ikki at gera tað.

Minst til at tendra blunkljósini í góðari tíð!

rff




Tá ið tú fert inn í eina kiosk ella handil at keypa, skalt tú seta bilin í høgru síðu.

Ber tað ikki til, mást tú venda bilinum.

- og minst til at sløkkja ljósini!

rff

## JOB til Fiskere & Søfarere

## CREW til Rederier, Skibe & Fabrikker

**www.haraship.dk**

Haraship - Crew Management
Phone: +45 60 60 34 83
Email: info@haraship.dk

HARASHIP



Taljur
Stroppar
Trýst-slangur
Spuli-slangur

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
100 Tórshavn - Tlf. 313442

www.sosialurin.fo

## Framsýning av klippmyndum

hjá Rasmus Rasmussen , verður á Torginum í SMS
frá mánadegnum 17. november
til og við fríggjadagin 21. november

Rasmus

# Sosialurin

*Lesið Sosialin - tað loysir seg*



MATRIKULSTOVAN 1942

## Matrikulstovan

Jónas Broncksgøta 27
Postboks 327
FO-110 Tórshavn
Tlf.: 357900
Fax: 357901
E-mail: post@matrikul.fo
Heimasíða: www.matrikul.fo

# Bókhaldari/skrivstovufólk

Fyri fólk í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara at seta 1. desember 2003.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur:
- Skrivstovuútbúgving
- Kunnleika til FSL bókhaldsskipanina hjá Gjaldstovuni
- Góðan teldukunnleika
- Góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Upplýsingar**
Fyrispurningar um starvið kunnu setast Øssur Á. Midjord, matrikulstjóra.

**Umsókn**
Umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til:

**Matrikulstovan**
**Postboks 327**
**110 Tórshavn**

Umsóknir skulu vera Matrikulstovuni í hendi í seinasta lagi 26. november 2003.

*Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Arbeiðsøkini á stovninum eru viðlíkahald av matriklinum, marknasetingar, útskiftingar, uppmálingar og kortlegging. Á stovninum starvast 18 fólk.*

MATRIKULSTOVAN 1942

## Matrikulstovan

Jónas Broncksgøta 27
Postboks 327
FO-110 Tórshavn
Tlf.: 357900
Fax: 357901
E-mail: post@matrikul.fo
Heimasíða: www.matrikul.fo

# Hjálparfólk

Søkt verður eftir hjálparfólki at arbeiða í matrikulsins umsiting og útskiftingini frá 1. des. 2003 til 1. juli 2004.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur:
- Matematiskt studentsprógv, HF ella líknandi prógv
- Góðan teldukunnleika
- Góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Upplýsingar**
Fyrispurningar um starvið kunnu setast Bjarna Hansen, leiðara av matrikulsins umsiting.

**Umsókn**
Umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til:

**Matrikulstovan**
**Postboks 327**
**110 Tórshavn**

Umsóknir skulu vera Matrikulstovuni í hendi í seinasta lagi 26. november 2003.

*Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Arbeiðsøkini á stovninum eru viðlíkahald av matriklinum, marknasetingar, útskiftingar, uppmálingar og kortlegging. Á stovninum starvast 18 fólk.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar 64 dagrøktarar, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Býlingshúsið inni á Gøtu**
Í Býlingshúsinum ganga 42 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum. Frá 1. januar 2004 verður eisini ein vøggustova.
Á stovninum arbeiða 9 starvsfólk.

**Býlingshúsið á Flat**
Í Býlingshúsinum á Flat ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum og einari vøggustovu. Á stovninum arbeiða 12

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið inni á Gøtu eftir:**
- einum pedagogi 40 tímar um vikuna í vøggustovu.
- einum hjálparfólki 40 tímar um vikuna í vøggustovu. Fólkini verða sett 1. januar 2004.
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 3. desember 2003.

Leiðari Poula Eidesgaard, tlf. 317701
Ovaragøta 30A
FO 188 Hoyvík

**Býlingshúsið á Flat eftir:**
- einum pedagogi 40 tímar um vikuna í Tjaldursstovu við 1- 3 ára gomlum børnum. Fólkið verður sett 1. januar 2004. Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 8. desember 2003.
- einum sjúkraavloysara 40 tímar um vikuna í Lundastovu við 1-3 ára gomlum børnum. Tíðarskeiðið er frá 24. november 2003 til miðjan januar 2004.

Leiðari Elsa Klein Olsen, tlf. 318371
Býlingshúsið á Flat
Per Mohrsvegur 11
FO 188 Hoyvík

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA




**Skattalistin**
Skattalistin skal beint aftan á 1. november liggja frammi í kommununi til alment eftirlit í 11 dagar. Skattgjaldari hevur høvi at kæra um skattaálíkningina hjá sær og øðrum skattaborgarum til økisskrivstovuna hjá Toll- og Skattstovu Føroya, um hann ikki heldur, at skattaálíkningin hjá honum sjálvum ella øðrum skattaborgara er bein.

www.torshavn.fo

## Skattalistin

fyri 2002

Skattalistarnir ár 2002 fyri Tórshavnar- og Kollafjarðar kommunur liggja frammi til alment eftirlit frá mánadegnum 17. november til mánadagin 1. desember 2003, báðir dagarnir íroknaðir.

**Skattalistin fyri Tórshavnar kommunu**
liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, allar gerandisdagar frá kl. 9.00 til kl. 16.00, tó hósdagar til kl. 18.00.

**Skattalistin fyri Kollafjørð**
liggur frammi í handlinum hjá Carl August Jensen frá mánadegi til hósdag kl. 9.00 til kl. 18.30, fríggjadag til kl. 20.00 og leygardagar kl. 09.00 til kl. 14.00.

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

## Skattalistin

Skattalistin hjá Skála Kommunu fyri árið 2002 liggur frammi til alment eftirlit á Kommunuskrivstovuni frá 17. nov. til 01. des. 2003.

**Skála Kommuna**

## Arbeiðshandskar

***til øll endamál - bæði á sjógvi og landi***

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar



**ADC-Heilsølan** spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820